HEILSUMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF HEALTH AFFAIRS



# Sjúkrakassagjaldið verður avtikið

Tann 1. januar 2010 fáa føroyingar eina nýggja heilsutrygd. Samstundis fer gamla skipanin við sjúkrakøssum og sjúkrakassagjaldi úr gildi.

Ístaðin fer TAKS at innkrevja gjald til nýggju almennu heilsutrygdarskipanina, sum kallast Heilsutrygd. Gjaldið verður eins fyri øll – 245 krónur um mánaðin, galdandi frá januar 2010. Børn undir 18 ár gjalda einki.

Eftir ætlan verður fyrsta gjaldið kravt inn síðst í februar, tí tað tekur tíð at fyrireika nýggju innkrevjingarskipanina. Síðani verður heilsutrygdargjaldið kravt inn mánaðarliga. Kunnað verður nærri um hetta í næstum.

**Strikað sjálvvirkandi flytingar**
Um ársskiftið dettur lógarkravda skyldan at vera limur í einum av teimum gomlu sjúkrakassunum burtur. Tí skulu fólk ikki longur gjalda til hesar sjúkrakassar.

Mælt verður til, at fólk strika møguligar sjálvvirkandi flytingar til sjúkrakassarnar skjótast til ber.

*Heilsutrygd er nýggj almenn heilsutrygdarskipan, ið tann 1. januar 2010 kemur fyri gomlu skipanina við 11 sjúkrakassum kring landið. Endamálið við nýskipanini er at tryggja øllum eina samhaldsfasta almenna heilsutrygd, har allir borgarar verða javnsettir viðvíkjandi inngjaldi og tænastum.*

HEILSUMÁLARÁÐIÐ · EIRARGARÐUR 2 · 100 TÓRSHAVN · TEL 30 40 50 · FAX 35 40 45 · HMR@HMR.FO · WWW.HMR.FO



## KUNNING UM almannaveitingar 2010

Broytingar í upphæddum við gildi frá 1. januar 2010.
Fyri 2010 eru veitingarupphæddirnar hesar(1):

**Almannapensjónir o.a.**

| | Kr. árliga | Kr. um mán. |
|---|---|---|
| Grundupphædd til fólkapensjón – støk | 50.028,00 | 4.169 |
| Grundupphædd til fólkapensjón – gift hvør | 39.756,00 | 3.313 |
| Grundupphædd til fyritíðarpensjón – støk | 69.852,00 | 5.821 |
| Grundupphædd til fyritíðarpensjón – gift hvør | 55.512,00 | 4.626 |
| Viðbót til fólkapensjón – støk | 37.884,00 | 3.157 |
| Viðbót til fólkapensjón – gift hvør | 29.328,00 | 2.444 |
| Viðbót til hægstu fyritíðarpensjón – støk | 69.432,00 | 5.786 |
| Viðbót til hægstu fyritíðarpensjón – gift hvør | 62.688,00 | 5.224 |
| Viðbót til miðal fyritíðarpensjón – støk | 22.536,00 | 1.878 |
| Viðbót til miðal fyritíðarpensjón – gift hvør | 19.584,00 | 1.632 |
| Viðbót til lægstu fyritíðarpensjón – støk | 21.276,00 | 1.773 |
| Viðbót til lægstu fyritíðarpensjón – gift hvør | 17.088,00 | 1.424 |
| Eyka viðbót til lægstu fyritíðarpensjónistar | 32.904,00 | 2.742 |
| Hjálparviðbót | 34.848,00 | 2.904 |
| Røktarviðbót | 69.552,00 | 5.796 |
| Avlamisviðbót/avlamisveiting | 32.592,00 | 2.716 |
| Frádráttarfrí inntøkupphædd – fólkapensjónistar | 59.800,00 | |
| Frádráttarfrí inntøkupphædd – fyritíðarpensjónistar | 89.700,00 | |

**Uppihald á stovni o.l.**

| | Kr. árliga | Kr. um mán. |
|---|---|---|
| Upphædd til persónligan tørv til persónar 60 ár og eldri | 11.772,00 | 981 |
| Upphædd til persónligan tørv til persónar undir 60 ár | 14.112,00 | 1.176 |
| Gjald fyri umlætting | 128,87 kr. | (um samdøgrið) |

**Viðbót til ávísar pensjónistar v.fl. (brennistudningur)**

| | Kr. árliga | Kr. pr. útgjald |
|---|---|---|
| Upphædd (3 útgjøld um árið) | 7.344,00 | 2.448 |

**Barnagjald og barnaískoyti til einsamallar uppihaldarar**

| | Kr. árliga | Kr. um mán. |
|---|---|---|
| Barnagjald smb. § 5 | 12.552,00 | 1.046 |
| Barnagjald smb. § 15, stk. 1 og 2 | 12.552,00 | 1.046 |
| Økt barnagjald smb. § 15, stk. 3 | 25.104,00 | 2.092 |
| Barnaískoyti smb. § 19a | 6.360,00 | 1.590 um ársfj. |
| Gjald til uppihald tveir mánaðir áðrenn og ein mánað aftaná føðing eftir § 6, stk. 1 | 1.240,36 kr. | (um mán.) |
| Gjald í sambandi við føðing eftir § 6, stk. 1 | 724,88 kr. | (eing. upphædd) |

**Gjald fyri uppihald á eldrasambýli**

| | | |
|---|---|---|
| Gjald fyri umlætting | 128,87 kr. | (um samdøgrið) |
| Gjald fyri uppihald á eldrasambýli støk | 3.558,00 kr. | (um mán.) |
| Gjald fyri uppihald á eldrasambýli hjún | 2.409,00 kr. | (um mán.) |

**Egingjald fyri serlig bútilboð fyri heimleys**

| | | |
|---|---|---|
| Serlig bútilboð fyri heimleys, § 11, stk. 2 | 1.776,00 kr. | (um mán.) |
| Eyka fyri kost í mesta lagi | 1.183,00 kr. | (um mán.) |
| Serlig bútilboð fyri heimleys, § 11, stk. 3 | 2.122,00 kr. | (um mán.) |
| Eyka fyri kost í mesta lagi | 1.183,00 kr. | (um mán.) |

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

(1) Sbr. kunngerð nr. 152 frá 3.12.2010 um áseting om javning av almannaveitingum.